Fótbóltssamband Føroya
The Faroe Islands' F.A.
Member of FIFA - UEFA - ÍSF

P.O. Box 3028
Gundadalur
FO-110 Tórshavn
FØROYAR (FAROE ISLANDS)

Telefon +298 35 19 79
Telefax +298 31 90 79
e-mail: fsf@football.fo
website: www.football.fo

Peningasambond:

| | |
|---|---|
| Føroya Sparikassi | 9181 - 263.457.2 |
| Norðoya Sparikassi | 9865 - 100.699.6 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870 - 100.251.2 |
| Pf. Føroya Banki | 6460 - 100.390.0 |
| Postgiro | 9909 - 006.858.6 |

**Til feløg og dómarar**

Dagf.: 31.03.2010

Ref.: VH/sk

**Mál: Viðvíkjandi dómaraseðlum í**

Vodafonedeildini
1. deild menn
2. deild menn
Løgmanssteypið
1. deild kvinnur
Steypakappingin kvinnur

Fyri at hækka støðið á úrslitatænastuni hjá FSF og sum ein hjálp hjá feløgunum, fjølmiðlum og almenninginum yvirhøvur at fylgja betri við, hevur FSF gjørt eina avtalu við Marna Mortensen – fyribils í eitt royndarár – um at hesin skal innlesa dómaraseðlarnar í omanfyri nevndu kappingum í ein dátugrunn beint eftir loknan dyst.

Seðlarnir/dystirnir verða síðani vístir í fullum elektroniskum líki á heimasíðuni www.faroesoccer.com. Hetta merkir, at bæði úrslit, støða, mál og kort v.m. er dagført og tøkt hjá øllum at síggja, so skjótt sum seðlarnir eru innlisnir. Informatiónin verður partvíst eisini at síggja á www.fsf.fo.

**Fyri at hetta samstarvið skal rigga optimalt, skulu dómaraseðlarnir sendast Marna beinanvegin eftir loknan dyst – og ikki seinni enn ein tíma aftaná.**

FSF heitir tí á dómararnar og feløgini, sum eru umfataði av hesi avtaluni – serliga 1. og 2. deild menn og 1. deild kvinnur – um at samstarva best møguligt, so dómaraseðlarnir kunnu koma uppá rætta pláss beinanvegin eftir loknan dyst. Hetta er eisini galdandi fyri báðar steypakappingarnar.

Eitt gott hugskot til dómararnar er at **goyma øll dómarakortini**, til kappingin er er at enda komin.

Dómaraseðlarnir kunnu sendast sum pdf fíla ella sum myndir
til fotboltshagtol@gmail.com
ella til telefaks 320516 (Marni Mortensen).
Seðlarnir kunnu eisini latast Marna persónliga í Maritugøtu 75, Hoyvík.
Marni kann eisini røkkast á telefon 320515 ella 520515.

ATLANTIC AIRWAYS    formula.fo

Heitt verður eisini á feløgini um at upplýsa **klokkutíðirnar** (og broyttar tíðir) til dystirnar í nevndu kappingum til fotboltshagtol@gmail.com, so skjótt sum hesar eru ásettar. Hetta so øll kunnu síggja, nær dystirnir byrja og hava ein møguleika at síggja teir.

Við vón um gott samstarv øllum fótbóltsáhugaðum at frama.

**Gevið gætur:**
FSF skal tó framhaldandi hava frumriti av dómaraseðlunum fyri at rinda dómarasamsýningina. Hetta merkir, at telefaks og skannaðir seðlar v.m. er IKKI er nøktandi til hetta endamálið.

Við ítróttarkvøðu
**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA**
**FaroeSoccer / Marni Mortensen**

S. Kollslíð

Sunniva Kollslíð